Dagf. 16. august 2021
HMR J. nr. 21/15354-12

Kaj Leo Holm Johannesen
landsstýrismaður

Svar

upp á

fyrispurning nr. 52-007/2021 eftir § 52a í tingskipanini um útreiðslur til rehabilitering á heilsuøkinum frá Johan Dahl, løgtingsmanni

Spurningurin var soljóðandi:

1. Hvussu stórar vórðu samlaðu útreiðslurnar til rehabilitering á heilsuøkinum, t.v.s. til endurvenjing og endurmenning - í 2018, 2019, 2020 og játtan 2021?

2. Hvussu vórðu útreiðslurnar býttar á tey 3 sjúkrahúsini hetta sama tíðarskeiðið?

3. Hvussu vórðu útreiðslurnar býttar á málbólkar ella slag av sjúkum hetta sama tíðarskeiðið?

4. Hvussu stóra játtan er ætlanin at seta av á fíggjarlógini til rehabilitering í 2022 og 2023?

5. Kann landsstýrismaðurin geva eina stutta frágreiðing um, hvussu innihaldið í samstarvinum millum heilsuøkið og kommunurnar um rehabilitering er skipað?

Svar:

Til spurning 1
Í hesum svarið verður rehabilitering avmarkað at fevna um tær lønarútreiðslur, sum eru knýttar at somatisku endurvenjingini á teimum trimum sjúkrahúsunum, tað vil siga fyrst og fremst ergoterapi og fysioterapi.
Útreiðslurnar til endurvenjing hava í 2018, 2019, 2020 og játtan 2021 verið hesar:

Talva 1: Játtan til endurvenjing (í 1000 kr.)				
Ár	**2018**	**2019**	**2020**	**2021**
Samlað	12.900	13.982	15.227	17.667

Í hesum yvirliti er parturin til m.a. endurmenning, ið fer fram innan psykiatriaka økið ikki tikin við. Tað er t.d. ergoterapi innan psykiatriska økið.

Til spurning 2
Hetta tíðarskeiðið vórðu útreiðslurnar býttar soleiðis á tey 3 sjúkrahúsini:

Talva 2: Játtan til endurvenjing (í 1000 kr.)				
Ár/stað	**2018**	**2019**	**2020**	**2021**
LS	7.432	7.599	7.948	9.112
KS	3.145	3.741	4.606	5.638
SS	2.323	2.642	2.673	2.918
Samlað	12.900	13.982	15.227	17.667

Afturat hesum eru fyri árini 2020 til 2021 hesar upphæddir settar av í fíggjarlógini, oyramerktar til rehabilitering. Av tí at fyrstu starvssetanirnar eftir hesi játtan ikki eru farnar fram fyrr enn seinast í 2020, er játtanin í ávísan mun nýtt til venjingarútgerð o.l.

Talva 3: Serlig játtan til rehabilitering (í 1000 kr.)				
Ár/stað	**2018**	**2019**	**2020**	**2021**
LS			1.000	550
KS			550	550
SS			450	550
Samlað	0	0	2.000	1.650

Til spurning 3
Tað er ikki einfalt at greiða frá, hvussu útreiðslurnar eru býttar á málbólkar ella slag av sjúkum hetta tíðarskeiðið.

Ein møguleiki er at hyggja at talinum av starvsfólkum fyri hvørt øki, og er samlaða talið av ársverkum:

Talva 4: Starvsfólk til endurvenjing				
	2018	**2019**	**2020**	**2021**
LS	16,70	16,70	16,70	19,70
KS	6,90	8,50	9,05	11,70
SS	5,42	5,70	5,38	6,39
Samlað	29,02	30,90	31,13	37,79

Á Landssjúkrahúsinum eru einstøku starvsfólkini í størri mun knýtt at serøkjum, meðan tey á Klaksvíkar sjúkrahúsi og Suðuroyar sjúkrahúsi eru býtt út á fleiri ymiskar viðgerðir. Í eini royndarverkætlan á heysti í 2020 varð ein talupedagogur (logopedur) settur. Hann er nú í føstum starvi í Sjúkrahúsverkinum. Setanarliga hoyrir hann til Landssjúkrahúsið, men hann arbeiðir á øllum trimum sjúkrahúsunum eftir tørvi. Eisini er galdandi, at serliga endurvenjing fyri Parkinsonsjúklingar fer fram á Suðuroyar sjúkrahúsi, og serlig framhaldandi endurvenjing fyri seinheilaskaða og PETØ-venjingar fyri børn fer fram á Klaksvíkar sjúkrahúsi.

Á Landssjúkrahúsinum eru 19,7 starvsfólkaársverk. Endurvenjing verður veitt til:
1,3 starv 6,6% til hjartaøkið
1,1 starv 5,6% til lungaøkið
5,2 starv 26,4% til neurologiska økið
0,3 starv 1,5% til giktaøkið
1,3 starv 6,6% til onnur medisinsk øki
2,0 starv 10,6% til krabbameinsøkið (nýtt tilboð)
0,3 starv 1,5% til lymfødem økið
5,2 starv 26,4% til skurð/ortopædi økið
0,7 starv 3,6% til barnaøkið
0,5 starv 2,5% til gynækologiska økið
1,8 starv 9,1% til psykiatriska økið (ergoterapi innan psykiatriska økið er ikki tald við)

Á Klaksvíkar sjúkrahúsi eru 11,7 starvsfólkaársverk. Endurvenjing verður veitt til:

innlagdar sjúklingar: Seinheilaskaða, neurologi, skurðsjúklingar, krabbameinssjúklingar, medisinskar sjúkur.

ambulantar bólkavenjingar: Ryggjasjúklingar, giktasjúklingar, akslar UE (undirekstremitetir), neurologiskir sjúklingar, hjartarehanilitering, lungnarehabilitering, aðrar medisinskar sjúkur, heittvatnsvenjingar og PETØ.

abulantar einstaklingavenjingar: Seinheilaskaða uppfylgjan, ryggnervaskaðar, lymfødemviðgerð, eftir skurðviðgerð, eftir hondskurðviðgerð, hond og armskinnarar, parafinbað til hendur, ergoterapi ávíst frá kommunulækna, børn, bandagistur, ortopædkirurgiskur skómakari.

Á Suðuroyar sjúkrahúsi eru 6,39 starvsfólkaársverk. Endurvenjing verður veitt til:

innlagdar sjúklingar: Neurologi sjúklingar, Parkinson sjúklingar, medisinskir sjúklingar, skurðsjúklingar, krabbameinssjúklingar og kroniskir pínusjúklingar.

ambulantar bólkavenjingar: Knæhold, mjadnahold, Parkinson, barnakonur, pinkubarnasvimjing, heittvatnsvenjing, akslar, neurologiskir sjúklingar, hjartarehabilitering og lungarehabilitering.

abulantar einstaklingavenjingar: Børn, Apopleksi/neurologi, eftirskurðviðgerðir, eftir hondskurðviðgerð, kroniskir sjúklingar, ryggsjúklingar, ítrottaskaðar, arrviðgerð og kroniskir pínusjúklingar.

Til spurning 4
Ætlanin er, at játtanin til endurvenjing skal hækka frameftir. Enn ber tó ikki til at siga, hvussu stór upphæddin verður í 2022 og 2023.

Til spurning 5
Innihaldið í samstarvinum millum heilsuøkið og kommunurnar um rehabilitering er skipað soleiðis, at øll trý sjúkrahúsini hava samstarvsavtalur við eldrasamtøkini í einstøku økjunum. Harumframt hava Sjúkrahúsverkið og Almannaverkið eina avtalu um samstarv tvørtur um geirarnar. Sjúklingar,

sum halda fram í øðrum geira, Almannaverkinum ella kommunala økinum, fáa eina endurvenjingarætlan við sær.

Eftir at kunngerðin kom í gildi, var neyðugt at fáa greiðar innanhýsis mannagongdir fyri, hvussu endurvenjingarætlanin skuldi útinnast. T.d er nú gjørd skabelón, sum tryggjar, at allar neyðugar upplýsingar eru við í ætlanini. Í byrjanin tók tað nakað av tíð at fáa fastar mannagongdir verksettar, men í dag eiga allir sjúklingar við tørvi á endurvenjing aftaná útskrivan at fáa eina endurvenjingarætlan við sær.

Sjúklingar omanfyri 67 ár, ið hava tørv á framhaldandi endurvenjing, eftir at teir eru útskrivaðir av sjúkrahúsi, fáa eina endurvenjingarætlan við sær. Oftast er samskifti við ávísu kommununa frammanundan, og endurvenjingarætlan verður send teimum. Onkuntíð eru eisini fundir við kommununa, áðrenn sjúklingurin verður útskrivaður til kommunala endurvenjing.

Endurvenjingarætlanin skal tryggja, at kommunan er væl skikkað at taka ímóti sjúklinginum og kann halda á við endurvenjingini í samsvari við tað, sum sjúkrahúsið hevur mett neyðugt.

Tað er ymist, hvussu kommunurnar skipa síni endurvenjingartilboð. Onkur kommuna hevur rehabiliteringsstovn, aðrar samdøgursrehabilitering og aftur aðrar dagtilboð. Til tíðir er eisini tørvur á, at kommunalu terapeutarnir fara heim til sjúklingin at venja.

Óansæð hvussu tilboðini vera skipað í kommununum, hevur Sjúkrahúsverkið við eini endurvenjingarætlan fyri einstaka sjúklingin tryggjað, at kommunur eru so væl upplýstar sum gjørligt, fyri at sjúklingurin skal kunna endurvinna mistar førleikar.

Heilsumálaráðið, 16. august 2021

Kaj Leo Holm Johannesen
landsstýrismaður